# Oddurin er púra javnur

**Mjølnir vann heimadystin á TB, og nú hava tey trý fremstu liðini í kvinnudeildini átta stig hvør**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað varð lagt upp til brak, og talan gjørdist eisini um brak.

Avgjørdi oddadysturin í flogbóltskappingini hjá kvinnum hetta vikuskiftið var í Klaksvík, har Mjølnir tók ímóti TB. Undan dystinum var TB liðið, sum við einum betri sett-muni enn KÍF var á odda í bestu deildini, og við sigri her kundu tær skræða seg leysar. Mjølnir var hinvegin tvey stig aftanfyri, so tær kundu í sín part leggja seg ájavnar við TB og KÍF.

Og tað var jústa hetta seinna, sum hendi. Í einum dramatiskum og spennandi dysti, sum gekk yvir øll fimm settini, eydnaðist Mjølni at taka stigini fyri dystin.

Longu í fyrsta settinum var líkt til, at talan kundi gerast um satt brak, og tó at Mjølnir tók hetta við 26-24, so knógvaði tað á ongan hátt stríðshuginum hjá tvørakvinnunum. Tvørtur ímóti, so løgdu tær enn meira fyri í øðrum setti, men tá Mjølnir so gav av grovfíluni triðja settið, tóktist TB vera í kreppu. Høvdu tær ikki so skjótt fingið um endan í fjórða settinum, so hevði dysturin helst eisini verið taptur longu tá, men enn einaferð sýndu tær, at tær á ongan hátt eru lidnar, hóast okkurt einstakt sett gongur teimum ímóti.

Talan gjørdist soleiðis um ein javnbrótara, og her var tað so heimaliðið, sum var hitt stinnara.

Sum sagt, so hevur Mjølnir við hesum lagt seg ájavnt bæði KÍF og TB í oddinum á stigatalvuni, og fyri flogbóltsáhugaðan er at fegnast um, talan tykist gerast um eina somikið javna kapping. Størsti spurningurin í so máta í løtuni tykist vera, úr hvørjum tilfari kvinnurnar hjá KÍF eri gjørdar úr, tí sálarliga skulu tær í øllum førum reisa seg, nú liðið hevur tapt tvær ferðir á rað. Slíkt kann ofta taka tíð, men tað júst tað, sum KÍF ikki hevur í løtuni. Longu komandi vikuskifti skulu tær til Trongisvágs, har TB eigur heimavøll, og hetta verður í øllum førum ein av dystunum, sum fer at gera av, hvat lið skal halda um oddasessin, tá farið verður í vetrarfrí.



*Tvær ferðir megnaði TB at stríða seg aftur í dystin, men tær máttu tó at enda geva seg yvir móti Mjølni*
*Mynd: SáH*

### ÍF basti Fleyr

Ein annar dystur var um vikuskiftið, tá Fleyr vitjaði á Kambsdali. Her var ikki stórvegis ivi um úrslitið. Eftir eitt toluliga langt fyrsta sett, gjørdi heimaliðið skjótt av, og sendu gestirnar suður aftur til Havnar við ongum.

## Máltindarnir

**1. deid kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 53 | (10) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 44 | (16) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 41 | (11) |
| Ioana Rápa | VÍF | 38 | (10) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 34 | (6) |
| Katarina Stepanovic | Stjørnan | 34 | (9) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 31 | |
| Milica Ergic | StÍF | 31 | (6) |
| Alina Olaru | StÍF | 30 | (9) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 29 | (4) |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 29 | (7) |
| Gurið Mortensen | VB | 28 | (4) |
| Irina Rodevici | VÍF | 27 | |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 27 | (3) |
| Bára S. Klakstein | Stjørnan | 26 | |

**1. deild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Blagoje Buha | Neistin | 44 | (13) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 40 | (6) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 38 | (2) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 38 | (18) |
| Damir Oros | KÍF | 36 | (13) |
| Henrik Gerster | H71 | 31 | (10) |
| Sámal Joensen | VÍF | 28 | (4) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 26 | |
| Áki Mørk | Neistin | 26 | (3) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 26 | (13) |
| Ingi Olsen | VÍF | 25 | (13) |
| Høgni Klein | Kyndil | 24 | |
| Mihai Marinescu | StÍF | 22 | |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 22 | (4) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 21 | |

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**
Mjølnir-TB 3-2 (26-24, 19-25, 25-12, 22-25, 15-10)
ÍF-Fleyr 3-0 (25-22, 25-12, 25-11)

**Meistaradeild menn**
ÍF-Fleyr 3-0 (25-15, 25-8, 25-22)

## Trygt hjá ÍF

Ein dystur varð leiktur í bestu mansdeildini í flogbólti um vikuskiftið.

Føroyameistararnir úr ÍF tóku á heimavølli móti botnliðinum, Fleyr, og her var eingin sum helst ivi um, hvønn vegin stigini skuldu fara.

Frá byrjan løgdu fuglfirðingar eitt stórt trýst á Fleyr, sum í teimum báðum fyrstu settunum einansn fekk 23 stig á kontina. Triðja settið kundu teir á heimaliðnum taka sær meira av løttum, men hóast Fleyr nú var betri við, so megnaðu teir ikki av álvara at gera um seg, og kundu ÍF so klintra enn eitt fet upp á stigatalvuni, har teir nú eru at finna á øðrum plássinum.

**-jm**

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 6 | 4 | - | 2 | 15 | 6 | 9 | 8 |
| 2 Mjølnir | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 8 | 5 | 8 |
| 3 KÍF | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 11 | 2 | 8 |
| 4 Dráttur | 5 | 2 | - | 3 | 10 | 11 | -1 | 4 |
| 5 ÍF | 5 | 2 | - | 3 | 7 9 | -2 | 4 | |
| 6 Fleyr | 6 | 1 | - | 5 | 4 | 17 | -13 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 0 | 12 | 8 |
| 2 ÍF | 4 | 3 | - | 1 | 9 | 5 | 4 | 6 |
| 3 SÍ | 5 | 3 | - | 2 | 11 | 8 | 3 | 6 |
| 4 Fram | 4 | 1 | - | 3 | 5 | 10 | -5 | 2 |
| 5 Fleyr | 5 | 0 | - | 5 | 1 | 15 | -14 | 0 |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 178 | 133 | 45 | 11 |
| 2 VÍF | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 154 | 127 | 27 | 10 |
| 3 VB | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 144 | 112 | 32 | 8 |
| 4 StÍF | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 147 | 142 | 5 | 7 |
| 5 Neistin | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 164 | 140 | 24 | 6 |
| 6 Søljan | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 121 | 177 | -56 | 2 |
| 7 Kyndil | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 84 | 161 | -77 | 0 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 123 | 113 | 10 | 8 |
| 2 Neistin | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 151 | 128 | 23 | 7 |
| 3 Kyndil | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 142 | 142 | 0 | 7 |
| 4 VÍF | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 132 | 125 | 7 | 4 |
| 5 H71 | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 126 | 141 | -15 | 2 |
| 6 KÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 125 | 150 | -25 | 2 |



# Bólturin fer á rull um fýra mánaðir

**Ætlanin er at fyrsta umfarið í landskappingini skal vera flaggdagin og tað síðsta fyrsta vikuskiftið í oktober**

SKIPANIN 2004
*Jóannes Hansen*

Tá ið ábyrgdarpersónar fyri føroyskum fótbólti leygardagin eftirmettu kappingarárið, sum fór, vórðu eisini fyrstu ætlanirnar fyri næsta kappingarár lagdar á borðið.

Sum tað varð sagt í blaðnum leygardagin, so er ætlanin hjá kappingarnevndini, at fyrsta umfarið í landskappingini skal vera á skránni sunnudagin 25. apríl ella flaggdagin. Hetta er tríggjar vikur fyrri enn fyrsta umfarið í landskappingini var á skránni í ár. Tá varð fyrsta umfarið spælt 16. mai.

Í ár varð spælt tvey vikuskifti í juli, og tað vórðu avgreidd tíggju umfør undan summarsteðginum. Upp undir summarsteðgin vóru tvey umfør spæld mitt í viku.

Yvirlitið yvir ætlanirnar fyri næsta ár boðar frá, at kappingin verður býtt í tveir eins stórar partar næsta ár. Undan summarsteðginum verða níggju umfør á skránni, og eftir summarsteðgin verða níggju umfør spæld. Síðsta umfarið undan summarsteðginum verður á skránni sunnudagin 4. juli, og fyrsta umfarið eftir summarsteðgin verður spælt sunnudagin 1. august. Í ætlanini eru allir landskappingardystirnir ásettir at vera í vikuskiftum.



*Eftir ætlan verða níggju umfør hvørju megin summarsteðgin í fótbóltslandskappingini komandi ár*

Á fundinum leygardagin varð víst á, at næsta ár verða seks av teimum tíggju feløgunum úr Eysturoy. Tí vera tað hvørja ferð í hvussu so er tríggir dystir í Eysturoynni. Feløgini í oynni kundu hugsað sær møguleikan at ein dystur var t. d. mánakvøld. Hetta varð ikki mett at vera nakar trupulleiki, skilja vit á lagnum.

### Fyrivarni

Bólkaumfarið í steypakappingini ætlast at verða avgreitt, áðrenn tað verður farið undir landskappingina. Fyrsta umfarið er ásett at vera sunnudagin 21. mars, og sætta og síðsta bólkaumfarið í kappingini um Løgmanssteypið ætlast at verða spælt sunnudagin 18. apríl ella eina viku undan fyrsta umfarinum í landskappingini.

Talan er framvegis um fyribilsætlanir ella eitt hugskot, sum FSF legði fyri feløgini. Tað hevur verið upp á tal, at fjórðingsfinalurnar í steypakappingini skulu spælast við heima– og útidysti og ikki, sum tað hevur verið higartil, bara avgerast í einum og sama dysti. Í ætlanini hjá FSF er lagt upp fyri hesum.

Enn er sjálvandi ikki greitt, um ætlanirnar fara at gerast til veruleika í øllum smálutum. Tað valdast eitt nú um, hvussu landsdystirnir fara at verða lagdir. Enn er ikki greitt, hvørjum Føroyar fara at vera í bólki saman við í HM undankappingini. Tá ið tað er greitt, fara umboð fyri londini at tingast um skránna. Men tað er longu greitt, hvørjar dagar FIFA hevur sett av til HM undankappingardystir. Tann fyrsti er leygardagin 4. september, tann næsti mikudagin 8. september, og so eru tveir dagar í oktober– leygardagin 9. og mikudagin 13.

Tað hevur verið vanligt, at landsliðið hevur verið uttanlands og spælt í undankappingum í vikuni eftir, at síðsta umfarið í landskappingini hevur verið spælt. Soleiðis var tað ikki í ár. Men ætlanirnar hjá FIFA, sum teir í FSF hava lagt upp fyri, boða frá, at tað er rættuliga stórur møguleiki fyri, at landsliðið eisini næsta ár fer at vera uttanlands í heystfrítíðini.

# Lokal loysn í Vági

**Fyri fyrstu ferð í tíggju ár hevur VB sett vágbing at hava ábyrgdina, tá ið felagið skal royna at røkka betri úrsliti, enn tað gjørdi í ár**

VB VENJARI
*Jóannes Hansen*

Eftir at útlendingar í fleiri ár hava verið venjarar, hava teir í VB lagt á annan bógv. Eftir sera soltna kappingarárið, har pólverjin Predrag Zivkovic var spælandi venjari, verður næsta ár ein vágbingur venjari. Tað veit VB heimasíðan at siga. Talan er um Hans Nielsen, sum er lærari og føddur og uppvaksin í Vági. Setningurin hjá honum verður at fáa VB burtur úr botnstríðnum, sum VB var partur av størsta partin av hesum kappingarárinum. Hans er fyrsti lokali venjarin hjá VB síðani í 1993, tá ið Egill Steintórsson og Páll Augustinussen høvdu ábyrgdina.

Úr Vági verður sagt, at enn eru viðurskiftini viðvíkjandi spælarum ikki komin heilt upp á pláss. Nógvu tey seinastu árini hava fleiri útlendingar verið í Vági og spælt fótbólt. Tað kann væl vera, at onkur fremmandur spælari eisini fer at vera í VB næsta ár. Men tað er ikki óhugsandi, at fleiri ungir spælarar fara at fáa møguleikan. Hesi seinastu árini hevur tað hilnast stak væl hjá VB. Bæði í dreingjadeildini og í unglingadeildini.

Hans Nielsen, sum er 40 ára gamalur, tók læraraprógv í 1987. Fyrsta árið var hann lærari í Runavík og síðani í Eysturskúlanum í mong ár, áðrenn hann flutti suður aftur til Suðuroyar at búgva. Meðan hann var í høvuðsstaðnum, tók hann lut í venjaraútbúgvingunum hjá FSF, og hann var venjari í yngru deildunum í B36.

Í fjør var Hans Nielsen hjálparvenjari hjá VB í 1. deild. Fyrra partin av árinum var Dragan Kovacevic venjari. Eftir at hann var uppsagdur, hevði Marek Vierzbicki ábyrgdina, og tá var tað, at Hans Nielsen var hjálparvenjari. Hans spældi í síni tíð á besta liðnum í Vági, men hann hevur ikki spælt saman við nøkrum av teimum, sum í ár vóru við til at manna liðið hjá VB.

### Nógvu útlendingarnar

Í Vági hava teir nógvu tey seinastu árini havt útlendskar venjarar. Oman fyri eru Predrag Zivkovic, Marek Vierzbicki og Dragan Kovacevic nevndir. Í 2001 og í 2000, tá ið VB vann fyrsta og higartil einasta FM heitið, og í 1999 var Krystof Popczynski venjari. Hann tók við longu eftir 9. umfarið í 1998, tá ið jugoslaviski Milan Milanovic fór úr starvinum. Milan Milanovic hevði eisini ábyrgdina í 1997.

Í 1996 var Tomislav Sivic venjari hjá VB. Árið eftir flutti hann til Havnar, har tað eydnaðist honum at vinna fyrsta FM heitið til B36 í 35 ár.

Í 1995 høvdu vágbingar lið í bestu deildini saman við sumbingum. Bjarne Hansen úr Danmark hevði ábyrgdina av Sumba/VB, og tá ið VB í 1994 vann 2. deild var danski Peder V. Pedersen venjari. Í 1993, 1992 og í 1991 var talan um lokalar venjarar. Í 1993 høvdu Egill Steintórsson og Páll Augustinussen ábyrgdina, og í 1992 og í 1991 var Jóannes Jakobsen spælandi venjari í Vági.

# Gamal kenningur venjari hjá B71

**Fyrrverandi B71 venjarin er nú hjálparvenjari í Qatar, har eingin annar enn Batistuta sigst vera á veg í felagið**

B71 VENJARI
*Jóannes Hansen*

B71 hevur fingið nýggjan venjara. Hann var á Sandi síðst í síðstu viku. Fríggjakvøldið vandi hann saman við B71 liðnum, og á ferðini sunnanfyri Skopunarfjørð varð sáttmáli undirskrivaður millum hann og B71.

Talan er sambært almennu B71 heimasíðuna um Ole Andersen. Hann er dani og ikki nakar ársungi. Hvørki í aldri ella í fótbólti. Ole Andersen er 64 ára gamalur, og hann hevur spælkt fótbólt og verið fótbóltsvenjari so at siga alla sína tíð.

Tá ið hann var 20 ára gamalur, flutti hann til Sveis. Har spældi hann við FC Bader, sum var í næstbestu deildini. Tað mesta av fjøruti teimum seinastu árunum hevur hann verið í Sveis.

Í 1999 var hesin Ole Andersen venjari hjá FS Vágum. Hetta árið var Vágaliðið í næstbestu deildini. Teir vunnu deildina og fluttu harvið upp í 1. deild. Tað gekk ógvuliga væl hjá teimum. Av teimum átjan dystunum vunnu teir sekstan, og málmunurin var 78–27.

Gamli FS Vágar venjarin er sambært B71 heimasíðuna heilt forliptur í Føroyum, sum hann gleðir seg at koma aftur til:

Ole Andersen er eisini grafikari, og tað liggur væl fyri hjá honum at tekna. Tað sæst eitt nú í bókini Fodboldtricks. Har eru ein rúgva av fótbóltsstøðum teknaðar, og tað er Ole Andersen, sum hevur teknað tær allar.

### Í arabiska heiminum

Í fjør var málverjin Valdemar Nowisci venjari hjá B71 stóra seinnapartin av kappingarárinum. Hann tók ábyrgdina á seg, tá ið felagið hevði mett tað neyðugt at siga belgiska Tom Sanitfiat úr starvinum.

Sambært B71 heimasíðuni so hevur belgiski venjarin ikki givið skarvin yvir sum venjari, sjálvt um hann ikki varð mettur at vera nóg góður at venja 2. deildarliðið hjá B71. Nú er hann í Qatar. Har er hann hjálparvenjari hjá landsmanni sínum Walter Meeuws. Teir eru í einum felag, sum eitur Al Etehad Sports Club.

Í Qatar eru nógvir oljupengar. Sjeikarnir brúka nógvar pengar upp á fótbólt, hóast tað í teirra verð man vera talan so at siga um piparnøtur. Teir keypa spælarar, sum hava sæð sínar bestu dagar í Europa, men sum einki hava ímóti at vinna pengar aðra staðni.

Ein av hesum er argentinski Gabriel Batistuta, sum hevur roynt at vera heimsmeistari, og sum í nógv ár spældi í Italia. Hann er í einum felag í Qatar, sum tað ikki gongst nakað serligt hjá. B71 heimasíðan veit at siga, at hann sigst vera á veg til Al Etehad Sports Club, og harvið skal Tom Sanitfiat venja Batistuta, hóast hann Í fjør ikki kundi brúkast sum venjari hjá Eli Hentze og Páll á Reynatúgvu!